FØÐINGAR

14. nov. fingu Róa Midjord og Niels Pauli Thomsen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 54 cm og vigaði 4000 gr.

28. nov. fingu Petra Weihe og Per Mikkelsen, Strendur, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3800 gr.

1. des. fingu Kristina Eysturberg og Róland Joensen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3950 gr.

5. des. fingu Hansa og Høgni Vest, Klaksvík, ein son og Áron fekk ein lítlabeiggja. Hann var 55 cm. og vigaði 3990 gr.

5. des. fingu Conny og Regin Mikkelsen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3740 gr.

6. des. fingu Arnhild Tausen og Jonhard Vestergaard, á Mørkini, Sumba, eina dóttur. Hon var 49 cm. og vigaði 3300 gr.

6. des. fingu Maria og Gunleiv Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3450 gr.

7. des. fingu Eyðvør og Jógvan Arni Petersen, Sørvágur, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 4450 gr.

8. des. fingu Varna av Rana og Brandur Højgaard, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 3800 gr.

9. des. fingu Diana W. Holm og Oluf Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3670 gr.

9. des. fingu Winnie Hansen og Jeffri Joensen, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 4000 gr.

9. des. fingu Rosa-Mari Mortensen, Skálavík og Schønning Hentze, Skopun, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 4580 gr.

9. des. fingu Eva og Jákup Klein, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 58 cm. og vigaði 4700 gr.

9. des. fingu Gunnvá og Mikael Viderø, Argir, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 3000 gr.

10. des. fingu Unn og Hjartvard, Signabøur, ein son. Hann var 49 cm. og vigaði 3100 gr.

11. des. fingu Katrin Hoydal og Einar Brimnes, Velbastaður, eina dóttur. Hon var 57 cm. og vigaði 4050 gr.

11. des. fingu Anni og Arnfinn Olsen, Toftir, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4600 gr.

11. des. fingu Gunnleyg Árnafjall og Andrias Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4000 gr.

11. des. fingu Anna Maria og Jógvan Hans Østerø, Velbastaður, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3500 gr.

ANDLÁT

01. desember
Jona Maria Julianna Niclasen, vanliga nevnd Lulla, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Brønshøj, 69 ár.

05. desember
Hans Pauli Højgaard, á Toftum, vanliga nevndur, Palli, 79 ár.
Ragnfríð Debes Michelsen, í Havn, 40 ár.
Dánjal Pauli Weihe í Porkeri, 42 ár.
Ragnar Hansen, Nes, 60 ár.

09. desember
Leivur Joensen á Oyri, 59 ár.
Elisabeth Wilhelmsen, Tórshavn, 37 ár

10. desember
Dánial Petur Eliasen, Fuglafjørður, 86 ár.

11. desember
Esbern Christiansen, ættaður úr Fugloy, búsitandi í Klaksvík, 80 ár

TILTØK

Gudstænastur 3. sunnudagur í advent
Havnar kirkja: kl. 11, Bjarni Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Nólsoy: kl. 12, Sonja Klein
Kvívík: kl. 12, altarg., (skriftarmál kl. 11.50) Inga Poulsen Dam. *Í Vestmanna, Hósvík, Hvalvík, Haldórsvík og Tjørnuvík gongur talvan fyri Guðs orðs boðan. Í Kvívík gongur talvan fyri kirkjuna*
Christianskirkjan: kl. 11, *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
Christianskirkjan: kl. 20, jólakonsert, Niels Pauli Danielsen
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10, *Árnafjørður:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
Funningur: kl. 12 messa, *Eiði:* kl. 17 nggju-lestra gudstænasta
Norðskála: kl. 19 nggju-lestra gudstænasta, Emil Olsen
Fríðrikskirkjan: kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
Svínoy: kl. 12, altarg., Elsa Funding
Bour: kl. 12, David Johannesen
Tvøroyri: kl. 11, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri føroysku Sjómanskirkjuna
Tvøroyri: kl. 17 »Vit syngja jólini inn«
Porkeri: kl. 12,
Sumba: kl. 17 barnagudstænasta, Luciagongd. *Í Vági og Sumba gongur talvan fyri Hina føroysku Sjómanskirkjuna*
Fuglafjørður: kl. 12, altarg., Uni Næs
Rituvík: kl. 11, altarg., John S. Myllhamar og Meinhard Bjartalið. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
Skopun: kl. 19, familjugudstænasta. Børn luttaka við Lucialeiki, Jákup R. Hansen

Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 14.00-16.00 Jólaverkstaður fyri alla familjuna. Vit tilevna jólapynt og eta rísingreyt saman.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, Elisabeth Joensen talar. Vit syngja jólini inn kl. 17.00 Lusia, framsýning og drekkamuður. Øll eru vælkomin.

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

Meinigheitin í Hoyvík
Uppi á Brekku 3
Mánadagin kl. 20.30 Bønarmøti.
Sunnudagin onki møti.
Sunnudagsskúlin skipar fyri jólaveitslu í Hoyvíkar skúla kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Fríggjakvøldið kl. 20.00 verður jólahugni fyri teimum ungu. Eingin sunnudagsskúli og Juniormøti.
Sunnukvøldið kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Margreth Olsen.

Lívdin
Samkoman Lívdin hevur familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti, kl. 12.00 hvønn sunnudag í Hoyvíkar skúla. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.

KFUM og K
Eldrasamkoman hevur jólahugna við nátturða mánadagin kl. 17.00.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 15.00 Jólafest fyri børn undir skúlaaldur og kl. 18.00 fyri børn í skúlaaldri.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti. Øssur Andreasen talar.
Heimasíða www.hebron.fo

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 19.00 Jólaveitsla fyri øll.
Í morgin kl. 16.00 Jólaveitsla – sunnudagsskúlin og Delli.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli kl. 17.00 Møti.

Aglow-møti í Kvívík
Aglow-møti verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið kl. 20.00. Bæði kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

Glæman í Kvívík
Sunnudagin kl. 19.00 Møti við Remi Didriksen o.ø. Gittit syngur.

Saron Vestmanna
Sunnudagin kl. 18.00 Evangel. møti v/ Fríðbjørn Poulsen.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, onki møti vegna møti í Kvívík.

Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 og jólafest fyri børn kl. 17.00. Ungdómsmøti verður mánadagin kl. 20.00.

Keldan,Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Malmberg Olsen. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli í Thabor og á Kambsdali. Møti er kl. 18.00 við Frants Jensen. Innsavnan til Heimamissiónina. Ungdómsmøti er kl. 21.00.

ELIM
Vikuskiftismøti verður í Kelduni í Skálavík 13.-15. des.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Evangel. møti.
Leygardagin kl. 14.00 Bíbliuundirvísing við Zacharias Zachariassen. Evni: Joh. ev. – Endurføðingin, tryggleiki, eftirfylgjandi ávøkstur.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 14.00 Evangel. møti. Talarar: Z. Zachariassen, Símun Pætur á Torkilsheyggi, Hjørleif Vang, Gullak Madsen o.a. Sangkreftir úr Havn. Kaffi eftir møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Jólakonsert
Eystankóið hevur jólakonsert sunnukvøldið kl. 20.00 í Glyvra kirkju.

Missiónshúsið í Leirvík
Hugnakvøld fyri sjómonnum, útróðrarmonnum, egnarum og øðrum, í bygdunum Leirvík, Gøtu og Fuglafirði verður í missiónshúsinum í Leirvík leygarkvøldið kl. 20.00. Á skránni: Sangur, andakt, filmur um Hvilvtenni, spurnarkapping, drekka og burturluting. Hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20.00 Jólahugni fyri ung.
Leygardagin kl. 15.00 Jólafest fyri børn.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti/Alpha skeið. Øll eru vælkomin.

Samkoman Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Jólafest (ongin sunnudagsskúli). Tú ert hjartaliga vælkomin.

Samljóð í Skopun
Jólafestin hjá Betania verður sunnudagin kl. 16.00 í Samljóð. Børnini luttaka við spæli, sangi o.ø. Tit eru so hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Sunnudagsskúlakortini verða innheintaði. Einki møti um kvøldið vegna familjugudstænastu kl. 19.00 við luciagongd.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Onki ungdómsmøti verður leygarkvøldið.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Sigrið og Denny. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Ebba og Nimrod Midjord tala og syngja.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

Porkeris Kirkja
Týsdagin kl. 19.00: Vit syngja jólasálmar. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Bøkurnar verða innheintaðar, kakao og bollar. Kl. 18.00 Møti við Hallur Ludvig og Terja Nielsen, Mourits Mohr Viderø syngur, vælkomin.
Leygardagin kl. 16.30 verður andakt á eldrasmbýlinum.

Betania, Sumba
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Jólahald í Randers
Jólahald verður í Randers missiónshúsi (St. Blichersgade 1 c) leygardagin kl. 15.30. Jólaboðini, jólasangir, jólatræ, gávur til børnini, kaffi o.a. verður á skránni. So vælkomin til jólahald í Randers.

Jólahugni í Hirtshals
Jólahugni verður fyri allar føroyingar í Hirtshals missiónshúsi sunnudagin 15. des. kl. 18.00. Jólaboðini og sangurin vil Ljóða. Jólatræ, kaffi og okkurt til børnini verður eisini. So vælkomin til jólahugna í Hirtshals missiónshúsi.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319130/61 655400.

TILTØK

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bleðini eru til taks.
Mánadagin 16. des.:
kl. 10-16.30 Jólahugni
kl. 16.30 **Dreingjakórið undir Brúnni syngur.** Fyriskip. Eli Smith, Brita, Meta og Martha
Týsdagin 17. des.:
kl. 10-17 Jólahugni
Mikudagin 18. des.:
kl. 10-15 Jólahugni
kl. 15 **Næmingar hjá Andreu Heindriksdóttur og Ólavur Jacobsen spæla floytu og gitar**
Hósdagin 19. des.:
kl. 10-17 Jólahugni
Fríggjadagin 20. des.:
kl. 10-17 Jólahugni
Tilhaldið verður afturlatið 20/12 og letur oppaftur 02.01.03. Vit ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og eitt gott nýár.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað itriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við aftur-venjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Bliv limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
Ungdómsumboð: Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102. Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 14. des.: Runavík tlf. 44 70 10
Sunnudagin 15. des.: Eiði tlf. 42 30 06

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

BRÚDLEYP

Sunnudagin 15. desember giftast í Thailandi Rógvi Nolsøe Johansen og Budsara Intairat.
Brúdleypsadr.: Budsara Intairat
258 M. 1 Munegpak
Pakthongchat
30150 Nakronratchasima
Thailand

14. desember kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju Noomi Sigurðsdóttir Sørensen, Norðragøta og Petur Reinert, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, kunnu tekna seg á tlf. 441363 ella 443215 í seinasta lagi 8. desember 2002.

21. desember kl. 16.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Mimi Steintórsdóttir og Jan Otto Straagaard Holm, bæði úr Fuglafirði.

Leygardagin 4. januar kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreta Dam, Argir og Brynjer Gregoriussen, Tórshavn. Veitsla verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 213065 ella 313054 innan 20. desember.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 31. desember hava Marita og Andras E. Olsen í Norðragøtu verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin tann 4. jan. í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vijla gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin at tekna seg á tlf. 441671 ella 441042, innan 20. des.

Týsdagin 31. desember hava Jógvan Elias og Edith á Løgmansbø verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsdagurin verður hildin 28. desember kl. 19.00 í Pálsstovu í Tórshavn. Tey, sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá í seinasta lagi 15. des. á tlf. 317686 ella 217686.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Lovaður verið Harrin, Gud Israels, tí vitja hevur hann fólk sítt, og loyst hevur hann tað út…«
Luk. 1. 67

Plássið fyri felagssangi er vorðið minni tey seinnu árini. Vit vera meira og minni noydd bara at lýða á kór og sangbólkar. Hitt kristna kirkjuliðið líkist meira einum publikum, sum skal undirhaldast, enn einari meinigheit, sum sleppur at syngja Gudi lovsang av hjarta og sál?

Felagssangurin eyðkendi lívið í mongum kristnum samkomuhúsum fyrr. Tað var so gott, at kunna oysa sítt hjarta út við lovsongi til Guds æru. Vitnisburðurin frá mongum trúgvandi lá í, at syngja Gudi ein takkarsong fyri náði og frelsu. Fyri nøkrum menniskjum hevði ein ávísur sangur ella sálmur serstakan týdning, hann var teirra lívsvitnisburður bæði í kirkjuliðinum og úti í gerandisdegnum.

Í dag verður sagt, at tey ungu tíma ikki at taka lut í felagssangi, tey vilja sjálvi sleppa at trakka upp við teirra meira og minni professionella sangstíli. Viðari verður sagt, at vit skulu geva teimum ungu tað tey vilja hoyra, ikki tað teimum tørvar at hoyra, tí annars tíma tey ikki at koma í Guds hús. Harvið verður avdúkað, at tað er ikki ein innari megi, sum drívur, men teir ytru lutirnir. Tá er ein farin av kós. Vit vilja hoyra so mangt, men ikki altíð er tað hetta okkum er tørvur á. Holdið vil so nógv. Tí er sangurin í kristnum meinigheitum so líkur tí sangi, sum er á verðsligum dansistøðum, at tú kennir ikki mun á. Sangurin her í heiminum, má hava stuðul frá mikrofonum og sterkum hátalarum fyri at yvirliva. Tað kemst av, at hann er so grunnur, hevur einki veingjalag. Hann er ov fast heftir at tí tímiliga, og má laga seg eftir teimum ytru umstøðunum.

Men Gud legði teimum kristnu ein nýggjan sang í bróstið, ein sang, sum verðin ikki kann syngja við í.

Gamli Sakarias, sum vit hoyra um 3. sunnudag í advent, sang Gudi lovsang. Hjarta hansara var fylt at frøði og tøkk fyri at Gud vildi senda Jesus í heimin at frelsa fólk sítt. Verður forða menniskjum at geva ljóð fyri hesum lov- og takkarsangi, so kólnar hjartað og kristnilívið stirnar.

Lyfta vit kristnu eygu okkara frá tí, sum bindur her niðri, og upp móti himli, tá føðist lovsangurin í okkum, og hann vil uttan forðan bróta fram í hjartanum við mátti og mæli.

Amen!

John S. Myllhamar